# Tryggari grundarlag und

## Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum hugleiðir um viðurskiftini á sjúkrahúsunum í sambandi við fíggjarlógina fyri 2008



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður heldur, at tað er neyðugt, at skipa stýringina av sjúkrahúsverkinum betur enn higartil, og a sum mest fæst fyri pengarnar*

SJÓNARMIÐ

*Hans Pauli Strøm*
*Landsstýrismaður*

Tað er sera álvarsamt, at farið er so nógv út um játtanina á øllum trimum sjúkrahúsunum í 2007. Neyðugt er at seta tiltøk í verk, fyri at tryggja, at betri tamarhald fæst á støðuni, at stýringin verður so góð og sterk sum gjørligt, og at javnvág fæst millum játtan og rakstur.

Tiltøkini skulu vera bæði bráðfeingis og longri miðandi, so vit tryggja framhaldandi grundarlagið undir einum góðum sjúkrahúsverki - sjálvum hornasteininum undir øllum okkara heilsuverkið.

Samstundis sum leiðslurnar skulu veita vissu fyri álítandi fíggjar- og virksemisstýring, skal politiski myndugleikin tryggja, at haldgott fíggjarligt grundarlag verður lagt fyri rakstrinum.

**Samanfatandi**

Samanfatandi er neyðugt, at skipa stýringina betur enn higartil, og at sjúkrahúsverkið sum heild verið rikið so effektivt og rationelt sum til ber, soleiðis at sum mest fæst fyri pengarnar.

Fortreytirnar fyri at hetta kann lata seg gera, eru m.a.

*at alt sjúkrahúsverkið verður skipað sum ein eind við eini stýrandi leiðslu,*

*at stýringsamboð verða innførd, sum bæði skapa møguleikar og insitament til rationella fyriskipan, bæði viðv. fíggjar- og virksemisstýringini, og*

*at sjúkrahúsverkið hevur eina nøktandi játtan, tvs. at tað er samsvar millum játtan og kostnaðin av teim tænastum, ið verða kravdar av starvsfólkum og leiðslu á sjúkrahúsunum.*

**Meirnýtslan í 2007**

Tey 3 sjúkrahúsini høvdu eina meirnýtslu í 2007 uppá tilsamans 26 mió. kr. Lutfalsliga var meirnýtslan tann sama á øllum 3 sjúkrahúsunum. Og orsøkirnar vóru eisini nøkulunda tær somu. Tí kunnu vit lýsa meirnýtsluna við Landssjúkrahúsinum sum dømi.

**Av teim 20 mió. kr. í meirnýtslu á Landssjúkrahúsinum var býtið soleiðis:**

Lønir: 8,5 mió.kr. Meginparturin skyldast, at sjúkrahúsið fekk eina lægri lønarjáttan enn veruligu lønarhækkingarnar vóru sambært sáttmálunum. Orsøkin til hetta er, at allir stovnar undir landinum fingu játtað sama %-vøkstur til lønir í 2007 (1,7%), hóast sjúkrahúsini - við vaktum alt samdøgrið, hvønn dag í árinum - hava havt nógv dýrari sáttmálahækkingar (3,9%), serliga til teir lønartungu starvsfólkabólkarnar, læknar og sjúkrarøktarfrøðingar.

Haraftrat hava verið størri eykaútreiðslur av øktari sjúkufráveru – óivað eisini nógv ávirkað av áhaldandi áganginum og negativu umrøðuni av sjúkrahúsinum, ið er dagligt arbeiðspláss fyri útvið 800 fólkum.

Avloysarar: 4,2 mió.kr. Sera torført hevur verið at manna serlig førleikakrevjandi størv innan sjúkrarøktina. Tað hevur elvt til stórar meirútreiðslur til vikarar á intensivu deild og sonevnda neonatala økinum (t.e. ov tíðliga fødd børn).

Heilivágur: 4,0 mió.kr. Serliga til krabbameinsviðgerð, nýra- og giktasjúkur og sclerose er heilivágurin dýrkaður sera nógv, m. a. tí talan er um nýggjan og meira effektivan heilivág.

Orka, kostur o.a.: 3,3 mió.kr. Øllum kunnugt eru hesar vørur dýrkaðar nógv seinasta árið, munandi meir enn væntað og tað sæst eisini aftur í útreiðslunum sum ein meirnýtsla.

**Avleiðingarnir mugu ikki verða ein niðurlaging av sjúkrahúsverkinum**

Ein meirnýtsla er álvarslig og eigur sum so ikki at góðtakast. Í hesum førinum eiga vit tó at hugsa okkum væl um, hvat vit skulu gera við trupulleikan.

Øðrumegin ber jú ikki til at siga: okey, hatta er altso bara tað sum tað kostar, og so koyra vit bara víðari út frá tí, við teim hækkingum omaná, sum fara at koma... Tí so hevði jú ikki verið nøkur meining í at lagt fíggjarætlanir eftir eini tillutaðari játtan, ella yvirhøvur at havt eina leiðslu. So kunnu øll jú bara gera sum best ber til, tvs. anarki. Tí má ikki setast spurnartekin við, at stovnarnir skulu gera alt tað teir kunnu, fyri at halda seg til játtanina og í mest møguligan mun sleppa undan meirnýtslu.

Hinvegin mugu vit seta spurningin, hvat avleiðingarnar kunnu verða, um politiski myndugleikin ikki vil viðurkenna veruliga kostnaðarstøðið í sjúkrahúsverkinum, tá ið hetta ár eftir ár vísir seg at liggja hægri enn játtanin, sum politiski myndugleikin ásetir.

Skal raksturin - tvs. virksemið og tænastustøðið - á sjúkrahúsunum skerjast til eina játtan, sum ár eftir ár vísir seg at vera ov lítil, so kemur hetta at merkja eini stigvísa niðurlaging av føroyska sjúkrahúsverkinum:

- Tað støðuga menningararbeiðið sum alla tíðina skal vera, fyri dygd í arbeiðinum og trivnaði á arbeiðsplássinum, støðgar upp,
- tað verða versnandi møguleikar at loysa innanhýsis trupulleikar á sjúkrahúsunum, sum tvørturímóti fara at økjast og lemja dagliga virksemið,
- ónøgd frá borgarunum, sum vit annars hava sæð nógv til seinasta árið, fer at gera seg meira og meira galdandi,
- og í hesi óndu ringrás fara royndirnar at tiltrekkja góð starvsfólk við neyðugum førleikum og serfrøði at miseydnast.

**Sjúkrahúsverkið fyri stórum avbjóðingum**

Tað er ikki bara í Føroyum at tað er stórt og vaksandi trýst á útreiðslurnar til heilsuverkið. Hetta er veruleikin í øllum OECD-londunum, at sjúkrahúsútreiðslurnar veksa munandi meir enn almennu útreiðslurnar í miðal, og enntá meir enn miðal búskaparvøksturin. Tí standa vit fyri stórum avbjóðingum á hesum øki, um hvussu vit framhaldandi kunnu tryggja fíggjarliga grundarlagið undir einum góðum heilsuverki, sum í dygd er á sama støði sum í okkara grannalondum.

Tað er ongin einføld loysn, sum bara at siga, at vit góðtaka ikki meirútreiðslur, og so trongja karmin uttan atlit fyri veruliga kostnaðinum. Tann stóra avbjóðingin er, hvussu vit kunnu klára at hava tamarhald á útreiðslunum OG samstundis tryggja góðsku og menning í sjúkrahúsverkinum.

Hetta gerst bert í einum neyvum samstarvi millum sjúkrahúsverkið og politisku skipanina – landsstýrið og løgting – um hvørjar tænastur og hvørji tilboð sjúkrahúsverkið skal bjóða – og at hetta kann rúmast innan fyri ta játtan, sum verður ásett.

Tað eru júst hesi viðurskiftini, sum álitið um "Framtíðar sjúkrahúsverk í Føroyum" snýr seg um. Tað var til aðalorðaskiftis í løgtinginum í fjør vár. Í álitinum verður nærri lýst, hvørjar avbjóðingarnar eru, og hvørji ráð og tiltøk eiga at setast í verk.

**Tiltøk fyri at fáa javnvág og betri rakstur**

Tað ber ikki til bara at lata standa til við teirri skeivu gongd, sum ár eftir ár hevur verið millum játtanina og útreiðslurnar av sjúkrahúsverkinum. Neyðugt er við tiltøkum, bæði bráðfeingis og við strukturellum broytingum, so vit kunnu fáa betri tamarhald á útreiðslunum og neyðuga